

(endurlýsing)

# Sálarfrøðingur

Í sambandi við at sálarfrøðingur okkara fer í barnsburðarfarloyvi verður søkt eftir avloysara at byrja í starvi 1. mei 2008 ella eftir avtalu. Talan er um eitt 6 mánaða farloyvisstarv, sum kann verða longt.

**Starvið**

- Ráðgeving av starvsfólki á dagstovnaøkinum í mun til børn og ung
- Supervisión av starvsfólkabólkum og leiðarum
- Sálarfrøðilig kanning og eygleiðinging í mun til børn og ung
- Ráðgeving og supervisión av foreldrum í mun til børn og ung
- Fyribyrgjandi sálarfrøðiligt virksemi
- Kreppuhjálp

**Vit bjóða**

- Eitt fjølbroytt og spennandi starv á virkisøki í stórari menning
- Ymiskar og skiftandi yrkisligar avbjóðingar
- Ávirkan á egið arbeiðsøki
- Supervisión og skeið
- Eitt gott tvøryrkisligt arbeiðsumhvørvi

**Vit vilja**

Seta eitt fólk, ið hevur

- Útbúgving sum cand. psych. ella cand. pæd. psych.
- Áhuga í og royndir við smábarnaøkinum
- Hug og førleika at arbeiða konsultativt
- Góð samstarvsevni, er sinnað at hugsa nýtt og kann
- Arbeiða sjálvstøðugt

**Starvs- og setanarviðurskifti**

Talan er um eitt fulltíðarstarv, sett og lønt sambært sáttmála millum fíggjarmálaráðið og Magistarafelag Føroya.

**Meiri fæst at vita**

tá ið tú vendir tær til Birgit Debess, toymisleiðara ella Katrin Petersen, deildarleiðara, telefon 30 20 10.

**Umsókn**

Saman við upplýsingum um útbúgving og arbeiðsroyndir umframt viðmæli skulu vera Tórshavnar kommunu í hendi í seinasta lagi týsdagin 15. apríl 2008. Umsóknin verður send Postboks 32, 110 Tórshavn ella torshavn@torshavn.fo

*Aðalmálið hjá Barna- og ungdómsdeildini er at skapa umstøður fyri menning hjá børnum og ungum í Tórshavnar kommunu.*

*Á deildini starvast deildarleiðari, ein málsviðgeri og eitt ráðgevandi toymi við leiðara, trimum námsfrøðiligum ráðgevum og einum sálarfrøðingi.*

*Toymið samstarvar við dagrøkt, dagstovnar, frítíðarskúlar og ungdómshús í kommununi í mun til námsfrøðiligar og sálarfrøðiligar spurningar.*

*Við støði í einum konsultativum hugsunarhátti arbeiðir toymið við m.a. ráðgeving, vegleiðing, yrkisligari sparring og menningar-þrojektum í mun til børn á dagstovnaøkinum.*

**Lesið meira um onnur støv á www.torshavn.fo**

Tórshavnar kommuna

# Deildarstjóri til starvsfólkaøkið

## Heldur tú, at starvsfólk eru týdningarmesta tilfeingið, vit eiga? Nú hevur tú møguleika at gera teg galdandi.

Starvið sum deildarstjóri á starvsfólkadeildini í Almanna- og heilsumálaráðnum er leyst at søkja til setan sum skjótast.

Deildarstjórin hevur ábyrgdina av virkseminum á starvsfólkadeildini í Almanna- og heilsumálaráðnum, har hesar fjølbroyttu uppgávur eru innan starvsfólkafyrisiting og HR-menning:

- At fyriskipa strategiskar menningarætlanir innan starvsfólkaøkið og ráðgeva í starvsfólkaviðurskiftum sum heild,
- At tryggja ein góðan starvsfólkatrivna, og standa fyri at starvsfólkapolitikkir verða orðaðir og dagførdir,
- At finna og fremja loysnir í truplum starvsfólkamálum og viðgera kærur,
- At útvega nýggj starvsfólk og virka fyri, at starvsfólk verða verandi,
- At luttaka í sáttmálasamráðingum og áseting av lønum,
- At menna eina felags lønarskipan fyri økið.

Virkisøkið hjá deildarstjóranum í Almanna- og heilsumálaráðnum umfatar alt almanna- og heilsuøkið. Samlað er talan um 2.400 ársverk og yvir 3.000 starvsfólk, sum eru starvsett í nógvu stovnunum innan økið og í stjórnarráðnum. Í mun til stovnarnar er talan um ráðgeving og fyriskipan av yvirskipaðum átøkum innan starvsfólkaøkið. Harumframt er stjórnarráðið kærumyndugleiki í mun til fyrisitingarligar avgerðir hjá stovnsleiðslunum.

Deildarstjórin er partur av leiðsluni í Almanna- og heilsumálaráðnum og vísir til aðalstjóran.

Umsøkjarin skal hava viðkomandi útbúgving frá hægri lærustovni umframt teir røttu persónligu eginleikarnar: duga væl við fólki, góð evni at samskifta og gera hugskot til veruleika. Tað er ein fyrimunur at hava hóskandi royndir frá líknandi starvi.

Starvið verður lønt ájavnt 37. lønarflokki hjá tænastumonnum landsins, umframt 15% í eftirløn, men uttan at talan er um tænastumannastarv. Setanartreytir annars verða ásettar í sersáttmála.

Starvsøkið fevnir um Almanna- og heilsumálaráðið og stovnar undir tí, umframt hini stjórnarráðini. Tænastustaðurin er í løtuni Almanna- og heilsumálaráðið.

Tann, ið fær starvið, má kunna tola broytingar í virkisøkinum og møguligar umskipanir.

Umsóknir við avritum av prógvum, CV og øðrum skulu sendast til: Almanna- og heilsumálaráðið, Eirargarður 2, FO-100 Tórshavn. Ella til ahr@ahr.fo innan kl. 12:00, 25. mars 2008.

Meiri fæst at vita um starvið við at venda sær til Poul Geert Hansen, aðalstjóra, á tel 304050.



KREA

ALMANNA- OG HEILSUMÁLARÁÐIÐ

Almanna- og heilsumálaráðið, ið umsitur almannamál, heilsumál og bústaðamál, veitir landsstýrinum ráð, tryggjar haldgott grundarlag og ger hugskot til veruleika. Í løtuni starvast 32 fólk í ráðnum.

*Vit draga eina línu - Vit seta skynsemi í hásæti - Vit vilja vita - Vit bróta slóð*

Eirargarður 2 . FO-100 Tórshavn
Tel 30 40 50 . Faks 35 40 45 . ahr@ahr.fo . www.ahr.fo